gult cyan magenta svart



# Skulu vinna álitið aftur

**Sveisiska landsliðið, sum í dag skal spæla móti Føroyum, skal fyrst og fremst byggja upp sjálvsálitið eftir greiða tapið fyri Litava**

LANDSDYSTUR
*Jákup Mørk*

Einki er at ivast í, at bæði leikarar og viðhaldsfólk hjá Sveis rokna við, at liðið vinnur tveir lættar sigrar, tá teir fríggja- og leygardagin skulu royna seg móti føroyska manslandsliðnum i hondbólti.

Sveisiska heimasíðan, swissinfo.ch, skrivar, at tað fyrst og fremst ræður um hjá teimum at byggja upp sjálvsálitið, eftir at liðið heldur óvæntað var fyri greiðum tapi í Kaunas, tá teir spældu útidyst móti Litava. Úrslitið av tí dystinum var 26-16 til heimaliðið, eftir at Sveis annars hevði vunnið fyrra dystin 26-23.

### Spælari fekk bank

Hóast landsliðsvenjarin, Arno Ehret, sigur seg rokna við tveimum torførum dystum, so leggur hann tó afturat, at hann roknar við, at leikarar hansara finna fram betri spæl enn tað, sum liðið sýndi í Kaunas.

Í mun til tann dystin noyðast sveisarar annars at vera ein leikara fyri uttan. Talan er um Fabian Lemann, sum varð skaddur á ferðini í Litava. Ikki orsakað av nøkrum óhappi á vøllinum, men tí hann varð avbukaður av einum illum hýruvognsførara í Kaunas.

### Stór uppgáva

Hetta er ikki fyrsta ferðin, at Føroyar og Sveis hittast í altjóða dysti. Tá Føroyar í 1976 luttóku í C-HM kappingini í Portugal taldist Sveis millum mótstøðuliðini. Úrslitið ta ferðina var ein tepur ósigur til okkara upp á 20-21, men síðani er nógv vatn runnið í ánna.

Meðan føroyskur hondbóltur hevur ligið í dvala, hava sveisarar støðugt ment seg, og hóast ósigurin í Litva eigur liðið at roknast millum tey sterkastu í heiminum. Hetta sæst eisini aftur í styrkismetingini av liðunum, har Sveisarar eru styrkismettir í ovasta bólkin, meðan Rumenia í okkara bólki er mett sum nummar tvey.

Fleiri vilja tó vera við, at Sveis í løtuni ikki er eins sterkt, sum styrkismetingin sigur, men hóast hetta, so er einki at ivast í, at tað liggur enn ein stór uppgáva fyri framman hjá føroyska liðnum. Dystirnir hjá landsliðnum vera í kvøld, fríggjakvøldið, kl. 20.00 í Ítróttahøllin á Hálsi og leygardagin kl. 16.00 í Ítróttahøllini á Skála.

**Sveisiski landsliðshópurin**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Boccarelli Claudio | TV Suhr | 13-9-77 | mál | 1/0 |
| Ebinger Antoine | St. Otmar SG | 14-10-76 | mál | 19/0 |
| Meisterhans Christian | Kadetten SH | 16-6-69 | mál | 114/0 |
| Bruggmann Claude | Grasshoppers | 23-5-78 | vongur | 0/0 |
| Gautschi Thomas | Pfadi Winterthur | 28-1-76 | bakkur | 28/22 |
| Jenny Pascal | Kadetten SH | 23-3-74 | vongur | 40/59 |
| Keller Markus | St. Otmar SG | 16-9-75 | vongur | 17/29 |
| Kostadinovich Robbie | TV Suhr | 7-9-73 | strika | 104/347 |
| Lemann Fabian | Amicitia ZH | 17-6-76 | bakkur | 2/1 |
| Massa Stefan | St. Otmar SG | 2-4-75 | bakkur | 31/87 |
| Pavlovic Ivan | St. Otmar SG | 26-6-74 | strika | 19/9 |
| Sedioli Thomas | Wacker Thun | 12-10-71 | bakkur | 19/9 |
| Stettler Martin | Wacker Thun | 7-6-77 | miðja | 2/2 |
| Suter Michael | Kadetten SH | 4-11-75 | vongur | 47/100 |
| Ursic Ivan | TV Suhr | 6-12-76 | miðja | 35/58 |



*Annað vikuskiftið á rað skal føroyska hondbóltslandsliðið royna seg, og uppgávan sær ikki minni spennandi út hesaferð*

# Væntar lívligan fund

**Føroyskir bóndir eru ørkymlaðir og stúra fyri, hvat fer at henda, tá ES-avtalan um heilsufrøðilig viðurskifti, sum tekur burtur alt innflutningseftirlit við dýrum, kemur í gildi 1. februar. Hetta fer at síggjast aftur á kunnandi fundinum, sum Bóndafelagið skipar fyri í dag, væntar formaður Bóndafelagsins, Bjørn Patursson.**

BÓNDAFUNDUR
*Rúnar Reistrup*




Í dag klokkan 12.00 hevur Bóndafelagið bjóðað limum sínum til fundar á Búnaðardeplinum, har ætlanin er at kunna um ES-avtaluna um heilsufrøðilig viðurskifti, og um hvørjar avleiðingar hendan fer at hava fyri landbúnaðin, nú hon verður sett í gildi 1. februar.

Bjørn Harlou, landsdjóralækni, og Ásmundur Guðjónsson frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni fara at luttaka á fundinum og svara spurningum frá limunum í Bóndafelagnum.

Og at hesir verða nógvir, ivast formaðurin í Bóndafelagnum, Bjørn Patursson, onga løtu í.

– Føroyskir bóndir eru nokkso ørkymlaðir um avleiðingarnar, sum hendan avtalan fer at fáa fyri vinnugrein teirra, og eg merki ein ótta millum fólk fyri, hvat fer at henda. Men tað eru eisini tey, ið siga, at hesin ótti er ógrundaður, og eitt av endamálunum við hesum fundinum er júst at fáa møguligan ógrundaðan ótta burtur.

### Hvussu skal verjast

Heilt fitt av kjaki hevur verið um ES-avtaluna í fjølmiðlunum farnu vikuna, og her hava myndugleikarnir millum annað ført fram, at vinnan sjálv kann skipa fyri einum eftirliti av øllum innfluttum dýrum, nú almenna innflutningseftirlitið fellur burtur við ES-avtaluni.

– Hetta er nakað sum Bóndafelagið hevur arbeitt við, men vit duga ikki at síggja, hvussu eitt slíkt eftirlit kann tryggja okkum at sjúkur ikki koma inn í landið. Fyri okkum at síggja ber tað ikki til hjá Bóndafelagnum at krevja, at djór, ið verða innflutt uttan fyri vinnuna, verða kannað. Vónandi gerst støðan hesum viðvíkjandi eitt sindur greiðari eftir fundin, sigur Bjørn Patursson.

– Ein ætlan við fundinum er, at hann skal hjálpa felagnum við at koma víðari i hesum málinum. Vit ætla at hoyra hvat limirnir halda um hetta og annars fáa nakrar mytur annaðhvørt staðfestar ella avsannaðar, so vit hava eitt betri grundarlag at arbeiða víðari frá, sigur formaður Bóndafelagsins.



# hygg & hoyr

Frá fríggjadegi 12. januar til hósdagin 18. januar

## Ein nýggjur dagur hóttir




## Bestubitar: Ungar hendur 3:3




## Um eygu kundu dripið




## Okkara kokkar




# Andloysi

*Marna Jakobsen ummælir:*



Hesa vikuna havi eg als ikki hugt at sjónvarpi av tí einføldu orsøk, at tað, aftaná drúgvu jóla- og nýggjárssendingarnar, fall saman og gav upp ondina. Eg havi illgruna um, hví so var, og eg siga tað ikki ringt fyri tað, eg havi mangan sjálv havt hug at hjálpt til við avlátinum.

Tað hevur verið skrivað nógv um sjónvarpið seinastu vikuna, tað er um tað sama: ov lítið av peningi og ov fáar føroyskar sendingar. Tað er eisini týðiligt at okkurt er ravruskandi galið. Nú eru tey eisini farin at senda endursendingar av endursendingum. Hin parturin av sjónvarpskránni eru sendingar úr DR, og tey sum hava parabol, og tey eru mong, hava longu sæð tær flestu.

So mikið meira tíð hevur verið til útvarp. Har eru sendingarnar so støvutar, at tú má rista dustið úr hárinum aftaná.

Skal útvarpið vera eftirfarandi, so steðgaði lívið í mangar mátar upp umleið 1950. Tó ikki tónleikalívið, tí har hoyrist sjongur »morgen, middag, aften.«

Sjálvandi eru sendingar við søguligum innihaldi týdningarmiklar at hava á skránni, men tað tykist vera ógjørligt at tosa um aktuell mál í útvarpinum. Tað aktuella kemur fram í tíðindum og sum tjaksendingar, har tað í høvuðsheitum eru politikarar, ið sleppa framat. Tað sum eg haldi manglar, eru djúptgangandi, vælgjøgnum arbeiddar sendingar um vanligt nútímans fólkalív.

Dømi um slíka sending var týskvøldið, tá ið evnið í sendingini »Føroyar í dag«var um kostvanar hjá føroyskum børnum. Óluva Zakariasen gjørdi eina góða sending, har hon lýsti evnið sera væl, sett saman av áskoðanum hjá fakfólki og faktaupplýsingum um kostvanar og hvat árin teir kunnu hava á uppvaksandi ættarliðið.

Eg haldi avgjørt, at tað er áhugavert við søgum úr gomlum døgum. Til dømis tær báðar hjá Jógvani Arge, har prát hevur verið við jólagestin Jóhan Hendrik Winther Poulsen, prát er kanska nakað nógv sagt, Jógvan Arge dugir sera væl at lodda dýpið, nær skal tú spyrja og nær skal tú lata vera. Jóhan Hendrik vísti seg at vera frásøgumaður av guds náði. Langt síðani eg havi hoyrt eina so livandi frásøgn um lívið hjá barni á bygd, hvussu hendingar ávirka eitt barn á heilt annan hátt enn ein vaksnan. Frásøguhátturin var bæði álvarsamur og skemtiligur. Seint fari eg at gloyma, at treytin fyri at sleppa til Havnar var, at tú skeitti.

Ein onnur sending, sum eisini handlar um gamlar dagar var sendingin mánakvøldið um »Turkaránið í Vestmannaoyggjum.« Árni Joensen hevur skrivað, og tað er hann komin væl frá, dugir so væl at skriva, at tú situr við sveittabrot og bíðar eftir næstu hending.

Sendingin »Í víngarðinum« tykist mær løgin, hoyrir onkursvegna ikki heima í útvarpinum. Har er lítið av almennum áhuga, hóast tað verður »bedýrað«, at møtini eru fyri øll. Eg haldi, at tað er tí, at hon tykist ov privat. Evnini eru sjálvsagt av almennum áhuga, men tað er meira mátan tey verða viðgjørd, eg fýlist á.

Verturin tosar í telefon við fólk, so at man heldur, at hann situr í stovuni hjá sær sjálvum og tosar við eitt syskinabarn. Har verður t.d. nevnt navn á trúboðara og so verður sagt, at hann kenna vit øll. »Ja,« sigur hesin í útvarpsstovuni, »tað gera vit«. »Nei«, mutli eg við mær, »tað gera vit ikki!« So fáa vit at vita, at hann fær sendandi svenskt kvinnublað og at hann hevur varhugan av, at kvinnur hava nógvar trupulleikar. Eg siti og bíði eftir poentinum. Er tað tað, at hann heldur bløð ella er tað eitthvørt hann hevur lisið í hesum ólukku blað. Annars má eg siga, at samrøðuevnið var sera áhugavert. Nú skulu menn aftur taka ábyrgdina av bæði tí tímiliga og andaliga heima við hús. Eg legði til merkis, at ikki var sagt medábyrgd, og tað hevur týdning, tí eftir teirra tykki eiga kvinnur ikki at hava ábyrgdina av andaligum viðurskiftum. Men nú skal vend koma í.

Segði nakar miðøld. Tá var bannað kvinnum at ávirka børn andaliga, tí at tær vóru so syndafullar. Tað næsta verður, at slør verður innført sum kravt klædnaplagg.

Sendingin er at samanbera við eitt privat orðaskifti.

Sendingar við kristiligum innihaldi skulu sjálvandi vera í útvarpinum, t.d. dámdi mær væl sendingina, har eftirmeting varð gjørd av 1000 ára haldinum. Har tosaðu prestar og samkomuleiðarar á ein slíkan hátt, sum tað sømir seg vaksnum fólki. Tú hevði ikki fyri neyðini at turka slevið av útvarpslurtinum aftaná.